TILBOÐ

Galdandi frá 24. september til 8. oktober

Pitsa
Grandiosa ella
Grandiosa v/ kjøti og leyki

29.95

Mars 2-pakk, Twix Extra,
Snickers 2-pakk ella
Bounty trio

3 fyri

25.00

6 Wicky appelsin
ella jarðber

14.95

Läkerol 2-pakk

12.95

Malaco 210 g

19.95

Arcor karamellur
2 pakkar fyri

24.95

Shell við Ringvegin, á Frælsinum, í Gøtudali og í Klaksvík

REPROZ

STARVSLÝSING

Hevur tú skapanargleði og hugflog, og vilt tú síggja úrslit av tínum arbeiði?

So hevur Landsverk fýra spennandi og avbjóðandi størv, tú kanst søkja, har tú saman við dugnaligum starvsfeløgum kanst geva títt íkast til framhaldandi menning av okkara tænastum.

Deildarleiðari til bygningadeildina

Høvuðsuppgávur
- greina og raðfesta nýbygging og viðlíkahald við atliti at funktionaliteti, estetikki og góðsku
- góðkenna verkætlanir og taka støðu til møguligar broytingar, umframt viðgera onnur byggimál, har bygging, bygningar, lendi og formlist eru partur av viðgerðini
- arbeiða og uppbyggja ein politikk fyri almenna byggilist
- fyrireika og samskipa landsbyggireglugerð fyri Føroyar
- stuðla og menna eitt kreativt arbeiðsumhvørvi

Førleikakrøv
Tú ert útbúgvin arkitektur. Leiðsluroyndir og aðrar royndir frá verkætlanum innan byggivinnuna er ein fyrimunur.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Oyvind Brimnes, stjóra, á 540 801 ella á ob@lv.fo.

Verkfrøðingur til framleiðsludeildina

Høvuðsuppgávur
- yvirskipaður rakstur av skervverkunum saman við formonnunum á verkunum kring landið
- skipa fyri viðlíkahaldi og dagføring av verkunum
- kostnaðarmeta og eftirkalkulera asfalt- og verklagsarbeiðir

Førleikakrøv
Tú ert útbúgvin verkfrøðingur, ella hevur aðra viðkomandi útbúgving.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Torkil Olsen, deildarleiðara, á 540 841 ella á to@lv.fo

Verkfrøðingur/Arkitektur/Byggifrøðingur til verkleiðsludeildina

Høvuðsuppgávur
- byggileiðsla
- aðrar byggiharrauppgávur, t.d. prosjektstýring

Førleikakrøv
Tú ert útbúgvin verkfrøðingur, arkitektur, byggifrøðingur, ella hevur aðra viðkomandi útbúgving. Royndir innan viðkomandi virkisøki gevur fyrimun.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Kristian Rasmussen, deildarleiðara, á 540 851 ella á kr@lv.fo

Smiðjuformaður til maskinmiðstøðina

Høvuðsuppgávur
- leiða og reka smiðjuna í Kollafirði
- umvælingar av amboðum
- ábyrgd av seramboðum
- útleigan av amboðum innanhýsis
- viðlíkahald av ferjulegum

Førleikakrøv
Tú ert útbúgvin maskinmeistari, ella hevur aðra viðkomandi útbúgving og helst royndir innan økið. Góður teldukunnleiki og vanligt koyrikort krevst.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jóan Petur Patursson, rakstrarleiðara, á 540 950 ella á jpp@lv.fo

Setanartreytir
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmálunum millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum og CV skulu vera okkum í hendi 8. oktober. Merkið umsóknina ávikavist:
Starv á bygningadeildini · Starv á framleiðsludeildini · Starv á verkleiðsludeildini · Starv á maskinmiðstøðini

Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land